## Sjálvuppgávan 2004

Freistin hjá persónligum skattgjaldarum, ið ikki hava roknskaparskyldu, at lata inn

sjálvuppgávu
kapitalvinningssjálvuppgávu

er týsdagin 15. mars 2005.

Sama freist er galdandi fyri tey, sum hava skyldu at lata inn ognaruppgerð.

Sí eisini bóklingin “skatturin 2004” og heimasíðuna **www.tollskatt.fo**

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**






## TIL SØLU



MAZDA 2500 LASTBILUR
REYÐUR VIÐ TRÆLAST
ÁRG. 1998 · KM. 98000

**TEL 370 368 - BEST EFTIR KL. 19.00**

# Kunngerð

**frá útskiftingarnevndini á Syðradali**

Næsti útskiftingarfundur verður hósdagin 17. mars kl. 10 í skúlanum á Syðradali.

Fram verður lagt:
1. Kommunala ognartøkan.
   Kærufreistin er 3 mánaðir.
2. Broytt fyribilsætlan innangarðs. Viðmerkingar skulu verða nevndini í hendi í seinasta lagi 31. mars 2005.

N. v.

Øssur Á. Midjord
útsk.form.






***LFA Landsfelagið fyri fólk við autismu***

# Aðalfundurin

Aðalfundur felagsins verður
**leygardagin 12. mars 2005 kl 15.00**
**í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10 c, Tórshavn.**

*Byrjað verður við, at starvsfólk á Sambýlinum í Pætursgøtu í Tórshavn greiða frá teirra arbeiði við fólkum við Aspergers Syndromi.*

Síðan er aðalfundur við skrá sambært § 6 í viðtøkum felagsins.

**LFA Landsfelagið fyri fólk við autismu**

**Árligu fimleikaframsýningarnar verða:**

| | | |
|---|---|---|
| Við børnum leygardagin | 12. mars | kl. 13.00 |
| Við børnum og ungum leygardagin | 12. mars | kl. 17.00 |
| Við ungum og vaksnum mánadagin | 14. mars | kl. 19.00 |



**Havnar Fimleikafelag**

MASKINMEISTARAFELAGID

# Aðalfundur

Maskinmeistarafelagið hevur ársaðalfund
**á Grønlandsvegi 56**
**leygardagin 12. mars kl. 14.00**

Skrá sambært lógini.

**Nevndin**


Lesið
Sosialin
-so eru tit við!


## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin tann 6. mai 2005, kl. 13.00,** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir niðanfyri standandi ognir.

**1. Fastar ognir tilhoyrandi Sp/f Raspan.**

Talan er um ein samanbygdan vinnubygning, sum stendur á matr. nr. 246, matr. nr. 247 og matr. nr. 248 í Sørvági. Tað er trupult nágreiniliga at siga, júst hvar markið millum ognirnar gongur. Samanbyggingin er gjørd í stigum fyri nógvum árum síðani. Fyrst eystari parturin matr. nr. 248 og síðani vestureftir matr. nr. 247, og vestast er matr. nr. 246.

Bygningurin er av betong og er innrættaður nøkunlunda soleiðis:

**Matr. nr. 248, Sørvági**
*Kjallarin*: Her er sláturs- og kryvjivirkið hjá P/f Sørvágs Laks, sum tekur seg væl út sum snøgt, reint og nútímans virki. Alt sær út til at vera í góðum standi. Blóðgirúm, kryvjirúm, skiftirúm, skiljirúm og pakkirúm.

*Miðhædd:* Kantina við nøkrum borðum og plastikstólum, tvey vesi, vaskirúm, kassarúm, tvey skrivstovuhøli, fýrrúm, ísrúm og smiðja.

*Ovasta hædd:* Er útleigað til handilshøli.

**Matr. nr. 247, Sørvági**
*Kjallarahædd:* Garaga, grannarúm og sláturhús.

*Miðhædd:* Trukkrúm, gamal frystitunnil og kompressararúm.

**Matr. nr. 246, Sørvági**
Fóðurrúm.

**2. Rakstrarútgerð tilhoyrandi P/f Sørvágs Laks.**
Rakstrarútgerð til slátur og kryvjing av alifiski, so sum kølikør, støddarskiljari, tangar og pumpur, Baader 142, transportbond, ísmaskina, bandimaskinur, robottur, tveir trailaravognar, kassaknúsari og Toyota Dyna lastbilur.

Útgerðin stendur inni ella við áðurnevndu fastognir.

**3. Aliútgerð á sjónum tilhoyrandi p/f Sørvágs Laks**
Talan er um alla vanliga útgerð til aling av laksi. Útgerðin fevnir í høvuðsheitum um fylgjandi: Aliringar bæði størri og smærri, tvey stálanlegg, nótir, fortoyningar, fóðurskipan og tvær fóðurstøðir við tilhoyri umframt fýra alibátar.

**4. Aliloyvi tilhoyrandi P/f Sørvágs Laks**
Verandi aliloyvi er galdandi í 12 ár frá 1. januar 1994 og rennur sostatt út 1. januar 2006. Loyvið er ásett til nøkur nærri avmarkaði øki á Sørvágsfirði.

Víst verður til løgtingslóg nr. 70 frá 9. juni 1988 um aling av fiski v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 17. mai 2004 viðvíkjandi treytunum fyri at reka alivinnu.

Allar frammanfyri nevndu ognir verða seldar undir einum, burtursæð frá bátinum m/b »Jollan«, sum verður seldur fyri seg, men tó sama dag. »Jollan« hevur havnakenningarfrámerkið VA30, er frá 1985, av glasfipur, Deutz motor 192 HK. Longd 610 cm. breidd 215 cm. og dýpd 90 cm.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur verður hildin á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, **fríggjadagin tann 1. apríl 2005, kl. 14.00.**

Eitt meira útgreinað yvirlit yvir ognirnar og nærri frágreiðing framgongur av sølutilfari og søluuppstilling, sum fæst við at venda sær til Óla Jákup Kristoffersen, advokat, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145, e-mail ojk@jura.fo (j.nr. 20050079). Tilfarið kann eisini hyggjast ígjøgnum hjá nevnda advokati ella á Dómaraskrivstovuni.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Óla Jákup Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145, e-mail: ojk@jura.fo (j.nr. 20050079)** ið kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er um at síggja ognirnar.

**Føroya Fútarætt**
tann 8. mars 2005